# Ein svaklig løn

**Tað er eingin verja fyri at lata 56.000 krónur í løn um vikuna, og tá ein verja fyri hesum er, at læknarnir eru á samdøgursvakt, má eg bara taka meg til høvdið, tí ein slíkan lækna skal man als ikki fara til, sigur Jenis av Rana**

Leo Poulsen

Tað hevur skapt mikla øsing, nú tað er komið fram, at læknar, sum fara til Suðuroyar at hava forvakt, tjena heilar 56.000 krónur um vikuna.

Tá hetta kom Jenisi av Rana fyri oyruni, setti hann landsstýrismanninum í heilsumálum, Aksel V. Johannesen ein spurning á Tingi um hetta.

– Eg setti spurningin fram, tí eg trúði ikki mínum egnu oyrum, tá eg hoyrdi tað. Júst í hesum døgum sita vit og royna at spara allastaðni, har sparast kann. Vit fara inn allastaðni, eisini hjá teimum veikastu í samfelagnum, og ofta snýr tað seg um minni enn eina millión, vit klípa burtur av hjá pensjónistunum, sigur Jenis av Rana.

Samstundis hoyrist, at læknar kunnu fara eina viku til Suðuroyar og forvinna 56.000 krónur fyri sjey dagar.

– Bara tað, at landsstýrismaðurin váttar, at soleiðis er, ger, at eg standi púra býttur. Hvat er hetta fyri nakað? Hvussu ber hetta til í eini tíð, har vit annars royna at spara? Hvussu kann man oysla soleiðis?, spyr Jenis av Rana.

Tá so landsstýrismaðurin argumenterar fyri hesi skipanini, stendur formaður Miðfloksins púra býttur.

– Tú kanst ikki argumentera fyri at brúka so nógvar pengar til nakað sum helst. Eingin hevur rætt til at tjena 56.000 krónur um vikuna, og tá landsstýrismaðurin so sigur, at teir eru í døgnvakt, so taki eg meg til høvdið. Ein lækni arbeiðir í døgnvakt í sjey dagar, tá haldi eg, at man má halda seg burtur frá einum slíkum lækna, sigur Jenis av Rana.

### Kann ikki verjast

Heldur ikki argumentið um, at hendan skipanin hevur verið í Klaksvík í nógv ár, heldur Jenis av Rana nógv um.

– Tað argumentið kann heldur ikki brúkast, tí tú kanst ikki verja tann veruleika, at nakar kann tjena 56.000 krónur um vikuna, og tá tað nú er staðfest, má tað kannast og broytast ongantíð ov skjótt, sigur Jenis av Rana.

Hann sigur, at eingin hevur rætt til at tjena 56.000 krónur um vikuna, og slett ikki í einum samfelag, sum leitar eftir krónum og oyrum fyri at yvirliva.

Jenis av Rana er sjálvur lækni, men hevði hann sagt nei takk til eitt so trivaligt tilboð?

– Eg kundi havt sagt ja og lagt alt annað frá mær. Eg skal tó ikki lasta tey, sum taka av, tí vit eru jú øll bara menniskju. Men tann maðurin, sum verjir hesa skipanina, um hann ikki syrgir fyri at broyta lønina og fáa hana niður á eitt sømiligt støði, er hann verri enn undangongumaður hansara, sum jú noyddist frá, tí hann hevði brúkt for nógvar pengar, sigur Jenis av Rana.



*Jenis av Rana øtast um ógvusligu lønina, sum læknar fáa fyri forvakt á Suðuroyar sjúkrahúsi um vikuna*

---

# Vil skerja ferðaendurgjaldið

**John Johannesen segði á Tingsins røðarapalli í síðstu viku, at hann fer at leggja uppskot fram um at skerja ferðaendurgjaldið hjá tinglimum**



*John Johannesen ætlar, at tingfólk skulu fáa sama ferðaendurgjald, sum vanligi borgarin fær*

Leo Poulsen

Eitt mál, sum hevur fylt nógv hjá vanliga borgaranum, er spurningurin um ferðaendurgjald til tinglimir, og serliga munin á ferðaendurgjaldi sammett við tað ferðaendurgjald, sum vanligi borgarin fær.

John Johannesen ætlar sær at gera nakað ítøkiligt við hetta málið.

– Uppskotið liggur púra klárt juridiskt, og spurningurin er bara at fara rætt fram formelt, Skulu vit taka tað gjøgnum formansskapin í Tinginum, tí hetta er ein spurningur um Tingsins viðurskifti, so hevði tað kanska verið rætt at gjørt tað tann vegin. Hin møguleikin er at fáa ein tinglim frá hvør sínum flokki at vera við sum uppskotsstillarar til eitt tingmál, sigur John Johannesen.

Tað er hetta, hann kannar í løtuni, og fyri at fáa eitt slíkt uppskot ígjøgnum Tingið er sjálvandi neyðugt, at finna ein meiriluta fyri tí.

– Lat okkum nú síggja, hvussu leikur fer, og hvussu tingfólk eru til reiðar at viðgera síni egnu viðurskifti. Her eru tveir ójavnar í hesum máli. Tann fyrsti er tann veldugi ójavnin í koyripengum sum er hjá einum tingfólki og einum vanligum borgara, men her er eisini talan um ein ójavna ið ger, at tingfólk ikki eru líka stillað, sigur John Johannesen.

Hann sigur, at tað ofta eru fólk, ið fáa henda øgiliga koyripeningin, sum reisast og siga, at tingmannalønirnar skulu skerjast fimm prosent, nú tá tað verður spart aðrastaðni í samfelagnum.

– Veruleikin er tann, at tingmanalønirnar ikki eru serliga høgar, men tað eru nøkur tingfólk, sum fáa nakrar ágóðar, ið eru alt ov órímiligir sammett við vanliga borgaran og sammett við onnur tingfólk, sigur John Johannesen.

Uppskotið, sum liggur klárt, leggur upp til, at tingfólk fáa ferðaendurgjald eftir sama leisti, sum vanligi borgarin fær, og tað er ein risastór skerjing í mun til tað, sum tingfólk fáa í dag.